# Nú verður nógv dýrari at senda brøv og pakkar

**Stór hækking í postgjøldunum er á veg og nógv posthús afturat skulu lata aftur**

POSTVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður nógv dýrari at brúka Postverk Føroya.

Gongst sum ætlað, verða postgjøldini hækkað í næstum og sostatt fer tað at verða dýrari at senda bæði brøv og pakkar.

Postverk Føroya hevur søkt Posteftirlitið um loyvi at hækka postgjøldini. Men enn hevur Posteftirlitið ikki svarað og sostatt er óvist, um, ella nær, hækkingarnar koma í gildi.

Men tekur eftirlitið undir við Postverkinum, verður talan er um eina hampiliga stóra hækking í postgjøldunum.

Bergur í Garði, stjóri í Postverki Føroya, sigur, at Postverkið hevur søkt um loyvi til at hækka prísin fyri at senda brøv eini 10-15%. Samstundis er søkt um at fáa loyvi til at hækka gjøldini fyri at senda pakkar eini 20%.

Hetta eru miðaltøl, tí stórur munur er á, hvussu nógv tær ymsu hækkingarnar eru. Í summum førum eru hækkingarnar undir miðal og í øðrum førum eru tær yvir miðal.

Tekur Posteftirlitið undir við tilmælinum frá Postverkinum, verða hækkingarnar settar í verk eftir eina hóskandi kunning og freist til viðskiftafólkið hjá Postverkinum.

Annars sigur stjórin í Postverkinum, at Postverk Føroya hevur verið í eini serstøðu framum so nógv onnur postverk í øðrum londum.

– Hóast telduposturin hevur vundið nógv uppá seg, er talið á brøvum, sum Postverk Føroya hevur avgreitt, kortini hækkað hvørt ár, heilt til í 2003, tá ið tað minkaði aftur.

– Men hereftir vænta vit, at talið á brøvum fer at minka eini 3-4% um árið.

Bergur í Garði sigur, at í Danmark minkaði talið á brøvum í fjør eini 4 % og í Grønlandi var talan um eina minking upp á heili 8-9%.

– Tí ræður tað eisini um hjá Postverkinum at skilbøta raksturin.



*Samstundis sum Postgjøldini hækka, eru útlit til, at annaðhvørt posthús í Føroyum, verður stongd, sum frálíður. Tað eru 34 posthús í Føroyum, men eitt hóskandi tal er ímillum 15-20, sigur stjórin í Postverkinum, Bergur í Garði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Fleiri posthús latast aftur

Postverkið hevur eina játtan uppá 2,3 milliónir á fíggjarlógini.

Men endamálið er avgjørt, at tað skal hvíla í sær sjálvum.

Tað eru eisini tey greiðu boðini, vit hava fingið frá landsins myndugleikum, at raksturin av Postverkinum skal hvíla í sær sjálvum, sigur Bergur í Garði.

– Men tað er eisini málið, sum Postverkið hevur sett sær sjálvum, leggur stjórin afturat

Sostatt skulu postgjøldini ásetast soleiðis, at postverkið ikki gevur undirskot.

Eitt er at hækka postgjøldini, fyri at fáa roknistykkið at ganga upp.

Men Postverkið hevur eisini aðrar mátar at fáa rakstrarkostnaðin niður.

Og ein av hesum møguleikum er at lata posthús aftur fyri at spara útreiðslur.

Fyri nøkrum árum síðani ásetti Løgtingið beinleiðis, hvussu nógv posthús skulu vera í Føroyum.

– Sostatt hevði Postverkið onki val á hesum øki. Men í 2002 varð hendan lógin sett úr gildi aftur og síðani eru nøkur posthús stongd.

Yvirhøvur er talan um posthús á smáplássum, sum eru stongd.

Men Stjórin í Postverkinum sigur, at vit hava framvegis alt ov nógv posthús í landinum.

– Sostatt er ongin ivi um, at tað fara enn fleiri posthús at lata aftur, sigur hann.

Akkurát, hvussu nógv posthús fara at lata aftur, vil hann ikki siga enn.

– Men talan verður um posthús í teimum smáu og miðalstóru bygdunum, sigur hann.

Hann sigur, at í løtuni eru 34 posthús í landinum. Hann sigur, at av røttum skuldu ikki verið meiri enn 15-20 posthús í Føroyum.

– Tað hevði verið nóg mikið til at givið eina nøktandi tænastu.

Sostatt er væntandi, at sum frálíður fer umleið annaðhvørt posthús í Føroyum at lata aftur.

Kortini vil stjórin í Postverkinum ikki seta tal á, tí teir eru ikki lidnir at viðgera støðuna og at fleiri posthús fara at lata aftur, er ongin ivi um.

Í fyrsta umfari er kortini ætlanin at lata eini fimm posthús aftur.

Bergur í Garði sigur, at tað, at fara á Posthús, er sum at fara til handils.

– Fólk fara har sum handilin er og tað sama er partvís galdandi fyri postverkið.

Hann sigur, at undirstøðukervið er nógv batnað seinastu árini og sostatt er tað eisini nógv lættari at sleppa á posthúsið og tað eigur eisini at verða tikið til eftirtektar.

Hinvegin sigur hann, at so hvørt posthús lata aftur, verður postlutningurin umskipaður á teimum plássum, sum missa posthúsini.

– Verða posthús latin aftur, skal ein ein onnur loysn verða klár at seta í verk. Tað kann gerast við landpostboðum. Men tað kann eisini gerast við at ein handil í eini bygd eisini hava posthús.

Men hann sigur, at onki ítøkiligt er um aðrar loysnir enn.

– Tað, sum hevur størstan týdning, er, at vit hava eitt ávíst tal á viðskiftafólki til hvørt posthús.

Hvussu tað so fer at gangast hjá Postverkinum at lata fleiri posthús aftur, er ein heilt annar spurningur.

Tað skerst ikki burtur, at tað hevur verið ein stórur politiskur trupulleiki, hvørja ferð, tað er komið upp á tal at lata eitt posthús aftur.

Hóast politikarar formliga onki hava við málið at gera, hava teir verið sera eymir um posthúsini og tað er meiri enn so hent, at tað hevur elvt til politiskt kjak , tá ið talan hevur verið um at lata posthús aftur. Og tað er eisini meiri enn so hent, at mál um at lata posthús aftur, hava verið reist á sjálvum Løgtingi.

## Postverkið fingið loyvisbræv

**Í farnu viku fekk Postverk Føroya loyvisbræv frá Landsstýrinum, har karmarnir fyri postvirkseminum eru ásettir**

POSTVERK FØROYA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú hevur Postverk Føroya fingið loyvisbræv frá landsstýrinum.

Tað hevur leingi ligið í luftini, at Postverkið skuldi fáa loyvisbræv – ella vinnubræv – til at reka postvirksemi og í síðstu viku kom tað so.

Higartil hevur Postverkið verið rikið sum ein almennur stovnur undir landsstýrinum.

Postverkið varð rikin eftir lógini um postverk Føroya. Men sum ein liður í at gera Postverkið til ein vinnurekandi fyritøku, varð lógin um postvirksemið sett í gildi í 2001. Men ein fortreyt fyri hesi lógini, var, at Postverkið eisini fekk loyvisbræv og tað kom so í farnu viku.

Í loyvisbrævinum eru teir vinnuligu karmarnir fyri Postverkið ásettir og har verður eisini ásett, hvørji rættindi og skyldur, Postverkið hevur.

Ein avleiðing av, at Postverkið kom undir nýggju lógina frá 2001 og hevur fingið loyvisbræv, er, at nú er tað ikki longur landsstýrið, sum skal góðkenna postgjøldini.

Annars hevur tað verið so, at Postverkið hevur søkt landsstýrið um loyvi til at broyta postgjøldini. Og hevur landdsstýrið tikið undir við umsóknini, eru nýggju postgjøldini ásett í kunngerð.

Men síðani Postverkið fekk loyvisbræv, skal tað søkja Posteftirlitið um loyvi til at hækka gjøldini.

Posteftirlitið kann so ganga umsóknini á møti ella ikki. Men í øllum førum hevur landsstýrið mist alla ávirkan á postgjøldini og kann ikki longur leggja seg út í, antin postgjøldini hækka, ella ikki.

Men Bergur í Garði sigur, at hækkingin, sum nú er í umbúna, hevur onki við loyvisbrævið at gera.

– Tað var longu í mars mánaða, at vit søktu um loyvi at hækka postgjøldini og stóð tað til Postverkið, vórðu hækkingarnar langt síðani settar í verk.

Postgjøldini eru ikki hækkað síðani í 2001, men hinvegin eru lønirnar rættiliga nógv uppfarnar síðani tá, so tað er avgjørt neyðugt at høkka postgjøldini, sigur stjórin í Postverkinum.



# Løgreglan eisini ábyrgdarleys

**– Vit hava roynt at fáa kappkoyring undir skipað viðurskifti á koyribreytir burtur frá vegunum, men løgreglan og fútin hava verið ósamarbeiðsvillig, og tað ger ikki støðuna betri viðvíkjandi kappkoyring á vegunum, sigur Agnar Dahl, motorsúkklufjeppari og limur í MC-Føroyar**

FERÐSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eftir tilburðin týsdagin seinnapartin, tá løgreglan jagstraði og tók ein motorsúkkluførara í Suðurstreymoy, vísti bæði løgreglan og Fersðlutrygd á, at trygdin er í vanda við øktum motorsúkkluvirksemi í Føroyum. Agnar Dahl var í 2000 við til at stovna áhugafelagið hjá motorsúkklufjepparum í Føroyum, MC-Føroyar, og rekur hann eisini fyritøkuna AD-Import, sum innflytir og selur motorsúkklur og prutl.

Endamálið við áhugafelagnum var sambært Agnari at fáa avsíðis koyribreytir, so kappkoyring kann fara fram undir skipaðum viðurskiftum, og hann tekur frástøðu frá sjónarmiðunum hjá løgregluni og Ferðslutrygd, samstundis sum hann í ein mun vendir kanónini aftur móti teimum. Hann fýlist, at motorsúkklukoyrarar fáa skuldina fyri, at trygdin á vegunum er í vanda.



*Agnar Dahl fýlist á, at motorsúkkluførarar fáa skuldina fyri eitt nú tilburðin týsdagin, tá ein 20 ára gamal koyrdi 193 km/t*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Myndugleikarnir langt úti

Agnar Dahl sigur, at kappkoyring og skilaleys koyring altíð fer at vera, og at teir tí hava vent sær til myndugleikarnir við fyrispurningi um koyribreyt burtur frá vegunum til frama fyri trygdina.

– Men higartil hava vit bert møtt illvilja frá løgreglu og fúta, og treytirnar, teir settu fyri skipaðari koyribreyt, vóru sera órímiligar. Tað manglaði bara, at vit skuldu hava 4 metra høgt elektriskt hegn og tak omaná hesi koyribreytini, leggur Agnar skemtandi afturat. Á henda hátt metir hann ikki, at løgreglan hjálpir til at avmarka skilaleysa koyring á vegunum, og hetta er ábyrgdarleyst.

### Vandamikil løgregla

Tilburðurin týsdagin, tá tveir løgreglubilar jagstraðu 20 ára gamla motorsúkkluføraran, sum varð máldur at koyra 193 km/t, avdúkaði eisini løgregluna sambært Agnari.

– Tað er líka ábyrgdarleyst at fara at jagstra ein motorsúkklukoyrara, sum helst hevur koyrt væl skjótari enn 193 km/t, við tveimum løgreglubilum, tí tá setir tú øll onnur á vegunum í eins stóran vanda, sigur Agnar Dahl. Tá løgreglan enntá megnaði at fanga føraran á motorsúkkluni, kann ein sambært Agnari spyrja seg sjálvan, hvussu skjótt teir løgreglumenninir so sjálvir hava koyrt.

– Men løgreglumenn hava eisini brúk fyri at spæla, eins og vit onnur, og tað er møguliga ein orsøk til, at teir valdu skilaleyst og ábyrgdarleyst at fara at jagstra ein motorsúkkluføraran, í staðin fyri bert at fáa hansara nummarplátu, sigur Agnar Dahl. Munurin er sambært Agnari, at politistarnir kunnu gera hetta lógliga, meðan onnur mugu fara útum lógarinnar karmar.

### Jón takkaði nei

Agnar Dahl ger eisini viðmerkingar til upplýsingarnar frá Jón Kraagesten av Ferðslutrygd í gjár, sum óttast avleiðingarnar av øktum motorsúkkluvirksemi.

– Alt, sum hevur við motorsúkklur at gera, er bert blivið betri seinnu árini. Nógv fleiri hava koyrikort, og ferðin er farin niður munandi, sigur Agnar Dahl. Í hesum sambandi vísir hann á, at tað er eingin nytta at flyta aldursmarki frá 18 til 21 ár, sum Jón Kraagesten av Ferðslutrygd í blaðnum í gjár mælti til. Agnar Dahl sigur, at um lógleysi knallert-hugburðurin við øllum møguligum órímiligum treytum skal flytast yvir á motorsúkklurnar, verður hetta bert verri fyri trygdina.

– Tá MC-Boogie (tiltakið fyri øll motorsúkkluáhugað) varð hildið, varð Jón Kraagesten av Ferðslutrygd bjóðaður við, so Ferðslutrygd kundi hava sína ávirkan, men Jón takkaði nei, og tað hildu vit vera løgið. Agnar sigur, at um Jón Kragesteen nústaðni hevur uppdagað, at tað er ein motorsúkklumentan í Føroyum, hevur hann ikki havt fingurin á pulsinum.

Hann slær at enda fast, at hann á ongan hátt stuðlar skilaleysari og ólógligari koyring, men hann fílist bert á, at motorsúkklukoyrararnir fáa skuldina av m.a. tilburðinum týsdagin.

# Koyrikort til motorsúkklur økjast

**John Christiansen koyrilærari sigur, at seinastu 2-3 árini hava koyrilærarar merkt eitt »motorsúkkluboom« við fleiri og fleiri, sum taka koyrikort til motorsúkklur**

FERÐSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

John Christiansen, koyrilærari í Havn, er ein av teimum fimm koyrilærarunum í Føroyum, sum bjóða koyrikort til motorsúkklur. Hann sigur, at hann í yrki sínum veruliga hevur merkt øktan áhuga fyri motorsúkklum seinastu 2-3 árini.

– Vit hava merkt eitt »boom« viðvíkjandi áhuga fyri motorsúkklukoyrikorti, men hetta er eitt rák í øllum londunum kring okkum og ikki bert í Føroyum, sigur John Christiansen. Hann heldur orsøkina fyri økta motorsúkkluvirkseminum vera, at súkklurnar eru vorðnar nógv betri og tryggari, men eins og við bilum eru hjáárinini, at ferðin eisini økist.



*Mynd: Jens K. Vang*

### Tilkomin fólk

Í gjár søgdu bæði Tommy Brockie av løgreglustøðini og Jón Kraagesten av Ferðslutrygd, at teir óttaðust fleiri og fleiri ungar førarar, sum koyra ov skjótt, men John Christiansen sigur, at tað generelt eru tilkomin fólk, sum taka motorsúkklukoyrikort.

– Sum heild eru tey, sum taka koyrikort á motorsúkklu, yvir 30 ár, og eg fái so ikki eyga á nakað rák við fleiri og fleiri yngru motorsúkkluførarum, sigur John Christiansen.

### Minni enn í DK

John Christiansen sigur, at umleið eru 360-380 motorsúkklur skrásettar í Føroyum, og samanborið við Danmark er hetta talið sera lágt per íbúgva.

– Samanborið við Danmark per íbúgva skuldu umleið 800 motorsúkklur verið skrásettar í Føroyum, so motorsúkkluvirksemið í Føroyum er nógv minni í Danmark samanborið við fólkatali, sigur John Christiansen.